Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Nokk um blokk

## *Oddagrein*

Eitt av høvuðsargumentunum hjá varaløgmanni fyri fullveldisleistinum hjá samgonguni, ið eftir øllum at døma ikki er í samsvar við veruleikan er, at tað er bíligari fyri danskarar at skriva undir uppá fullveldisútkastið hjá samgonguni, heldur enn at lata blokkin halda fram til æviga tíð. Minnið er stutt hjá Tjóðveldismonnum. Tosað verður sum um blokkurin hevur verið síðani heimastýrislógin kom í gildi. Blokkstuðulsskipanin kom síðst í áttatiárunum. Tað var samgongan frá 1984 — 1988, har Tjóðveldisflokkurin hevði fíggjarmál, sum innførdi blokkstuðulsskipanina, og hevur hendan skipanin, ið kom í 1988, ikki meira enn 12 ár á baki. Tá var hettar mett at vera eitt stórt stig á sjálvstýrisleið, men nú gott 10 ár seinni er blokkurin í tjóðveldis- ella rættari sagt fullveldisterminologi vorðið ímyndin av øllum illum í føroyska samfelagnum. Blokkstuðulsskipanin var eitt stig á sjálvstýrisleið — eitt av nógvum stigum, ið hava verið tikin í meira enn hálvthundrað ár. Nú tykist steðgur at vera í sjálvstýristilgongdini, tí fullveldisætlanin hevur steðgað øllum øðrum. Alt er bygt uppá eina tesu, har sagt verður, at føroyingar verða meira og meira tengdir av stuðuli frá Danmark. Tað tykist sum um, at henda samgongan hevur sett sær fyri at hendan profeti verður sjálvuppfyllandi, og øll undanfarin stig á sjálvstýrisleið, sosum blokkstuðulsskipanin í sær sjálvum, verða ikki lýst sum tey áttu at verið lýst, tí at stig á sjálvstýrisleið hava sambært Høgna Hoydal ikki verið tikin í meira enn 50 ár — ella hvussu?

Vánalig kunning má tað sigast at vera, at borgarin ikki fær røttu mynd av blokkstuðulsskipanini, serliga tá hugsað verður um, at hendan samgongan brúkar milliónir av skattgjaldarans peningi til sonevnda kunning. Hendan sonevnda kunning, har heimasíður við politiskum greinum verða gjørdar og ivasamir faldarar verða sendir út fyri peningin hjá Hanusi og Janusi, er heldur pínlig í einum demokratiskum samfelag. Slík kunning ger, at borgarin druknar í informatión, men hungrar eftir vitan. Um kunningarpengarnir skulu koma til sín rætt, so átti eitt nú at verið kunnað um, hvørja ávirkan ein búskaparlig skiftistíð uppá 4 hevur.

Spurningurin er, um tað ikki er mannminkandi fyri eitt av heimsins ríkastu londum at krevja sømdir, ið útpínd afrikansk hjáveldi fingu eftir at verið útarmað og neyðtikin í fleiri ættarlið. Føroyingar kunnu fáa ein sjálvberandi búskap uttan nakran stuðul í morgin, men støðið á hesum sjálvberandi og kjølfesta búskapi, fyri at brúka orð Høgna Hoydals, hevði sjálvsagt verið lægri enn tað er nú. Tað er burturvið at krevja, at danska stjórnin skal prógva, at ein framtíðar føroyskur búskapur skal verða á núverandi støði. Um hald er í hesum logikki, hví so ikki bert royna at trífalda blokkin og so krevja loysing fyri danskar pengar? So skuldu danskarar eftir samgongulogikki skula prógvað, at ein sjálvberandi búskapur var á tí støði í framtíðar fullveldinum Føroyum.At danskarar royna at ræða føroyingar frá loysing er eitt afturvendandi evni hjá samgonguni. Hava vit ikki greitt fingið at vita óteljandi ferðir, at vit kunnu loysa nær vit vilja? Eitt annað afturvendandi evni hjá samgonguni er, at andstøðan letur seg brúka av danskarum. Hetta má vera ein undirmeting uttan líka og er tað ikki sørt skelkandi, at útvið helvtin at Føroya Løgtingi verður lagt undir at ganga ørindi fyri danskarar. Ein kundi kanska sagt, at omanfyrinevnda er eitt tekin um undirlutakenslur í føroysku fullveldisrørsluni, men tað er ikki rætt. Talan kann ikki vera um undirlutakenslur, tí samgongan er, sambært seinastu veljarakanning, við undirlutan.

***Sosialurin***

Viðmerking:

# Við at kódna í religiøsum møsni

At trúgva er ikki at vita. Um tann mannin, sum fyri 2000 árum síðani ferðaðist um í Palæstina, vita vit lítið og einki. Vit gita, at hann hevur havt karismatiskar gávur, tí fólk flokkaðust um hann. Vit vita, at hann av rómverjum var dømdur harðastu revsing, eina revsing, sum bert uppreistrarmenn og burturrýmdir trælir fingu – negldir á gálgatræ. At hann við sínum atfinningum var ein tornur í eygunum á prestastættini, farisearum og skriftlærdum, og at teir ikki forðaðu rómverska yvirvaldinum at grípa inn, tá hann umsíðir var handtikin, er skiljandi. At hann var uppreistrarmaður, er okkurt ið bendir á. Á Jesusar innreið upp til Jerusalem var hann fylgdur av stórari mannfjøld; tá sigur hann: Um onkur nú eigur tveir møttlar, tá selir hann annan og keypir sær svørð. Mannamúgvan hevur skilt, at hetta fór at fáa ein galnan enda – rómverska yvirvaldið var ikki til at spæla við – og hevur sloppið sær burtur. Í Gethsemana var eisini svørð á lofti. Eftir deyða Jesusar fóru søgur at ganga. Fólk fóru at tosa um, hvat var hent, at minna seg á, hvat hann hevði sagt. Ótrúligar frásagnir um undirgerðir, hann hevði framt, komu til. Á kirkjufundinum í Nikæa ár 325 varð Nýggja Testamenti redigerað seinastu ferð. Her var sumt av tí mest øra koyrt burturúr. Tíverri vóru Jóhannesar Opinberingar tiknar við, vóru tær koyrdar í bunkan við apokrýfum skriftum, var kristindómurin spardur fyri nógv høvuðbrýggj.

Hin kristna mentanin hevur sum grundarlag Gamla og Nýggja Testamenti og grikska heimspeki. Griksk heimspeki byggir á logikk, royndir og iva – trúgv flytur eingi fjøll, men ivin; tað var ivin, sum fekk Kopernikusi at koppa allari sólarskipanini. Aðrir stjørnufrøðingar, sum skiltu, at hetta var rætt, fingu kærleika kirkjunnar at føla. Stóð ikki í Bíbliuni, at sólin reis og setti á fyrsta skapanardegi? Seinni er mynd av Giordano Bruno reist í Rom – ein sein umbering.

Her í vesturheiminum er tað hin kristna mentanin, sum ræður, og hóast kirkjan sjálv altíð hevur verið afturhaldandi, so hava vit eina mentan á høgum stigi. Hugsið um tær prýðiligu katedralir (nú operahús) sum bygdir eru, tónlistaverk, myndlist, skaldskap-



ur av ymsum slag og ta civilu tøkni. Henda mentan hevur einki við tann mannin at gera, sum fyri 2000 árum síðani ferðaðist í Palæstina. Eitt dømi er pávakirkjan; pávin er so heilagur, at hann verður borin í stóli. Eitt, ið eyðkennir mentan okkara, er gransking – eitt forvitni, ein trá eftir at loysa tær náttúrinnar gátur, sum eru uttan um okkum. Tá Linné hevði flokka vøkstrirnar, var tað næsta at Darvin fór undir hinar skapningarnar. Í flokkin av súgdjórum kom menniskjan. At okkara nærmasti frændi er apan – chimpansan ella gorillain – fall mongum fyri bróstið. Hesa teori Darvins hava helst øll upplýst fólk góðtikið í dag, og tann vakra søgan um Edenhavan verður standandi sum ein partur av mentunnararvi okkara – ein fitt søga fyri børn.

Gransking heldur áfram, vit vilja kunna okkum á øllum lívsins økjum. Um 1948 fór amerikanski vitinskapsmaðurin Dr. A. C. Kinsey undir at kortleggja kynsmynstrið hjá fólki. Fyrst hjá mannfólki, síðan eisini hjá konufólki. Hann sendi út 10.000 spurnarbløð, úrslitið var millum annað, at 5% av øllum amerikanskum monnum vóru samkyntir. Seinni kanningar av monnum í Europa hava víst eitt líknandi úrslit – eingin synd – eitt frábregði í náttúruni, sum upplýst fólk góðtekur eins og menningarlæruna hjá Darvini.

Her í Føroyum verður tað helst seinur dagur. Her eru vit við at kódna í religiøsum møsni. Og nú vit skulu fara at hátíðarhalda kristningina av Føroyum og hava boðið mentaðum gestum, royna tveir tríggir trongdskygdir bygdateologar at gera seg upp og seta fót fyri hátíðarhaldinum.

**Janus Kamban**

# Tøkk frá tiltakinum Hesuferð og ein rættleiðing til Regin Eikholm

Vit skulu takka Edmundi Joensen, løgtingsmanni og formanni sambandsflokksins, fyri at hann hevur svarað okkara spurningum. Svarini tosa fyri seg sjálvi um hugsan og metingar hjá Sambandsflokkinum og tað er gott fyri orðaskiftið at tær koma fram. Eisini setur Edmund fram nakrar spurningar til Hesuferð, sum vit fara at svara í einum av fyrst komandi bløðunum.

Vit leggja samstundis til merkis, at Javnaðarflokkurin, Miðflokkurin og samgonguflokkarnir ikki hava svarað teimum spurningum, vit hava sett. Vónandi verður tað skjótt.

Inntil hesir hava svarað fara vit ikki at seta nøggjar spurningar. Hesuferð fer tó at koma við eini rættleiðing til eina meiningargrein, sum nú um dagarnar hevur verið í bløðunum.

Í grein í Dimmalætting skrivar Regin Eikholm, at ..“Í Íslandi var í 1918 og 1944 talan um næstan 100 % semju ella konsensus um loysing frá Danmark, bæði í Altinginum og millum íslendska fólkið...“ .

Móti hesum setur Regin Eikholm, „ at í 1946 tóku bert 1/3 av føroyska fólki undir við loysing“.

Vit skulu royna at gera upp atkvøðugreiðslurnar í 1918 og 1944 í Íslandi og 1946 í Føroyum á sama hátt. Vit kunnu ikki vita hvat føroyska fólkið ella íslendska fólkið hildu, men vit kunnu nágreiniliga gera upp, hvussu veljararnir atkvøddu.

Í 1918 tóku íslendingar støðu til spurningin um fullveldi við einari fólkaatkvøðu, og í 1944, aftaná 26 ára skiftistíð, tóku íslendingar støðu til spurningin um at loysa - seta tjóðveldið á stovn - við einari fólkaatkvøðu.

Í 1918 atkvøddu **40,5 %** av veljarunum í Íslandi fyri fullveldi. Í 1944, tá Ísland hevði havt 26 ára skiftistíð, atkvøddu **96,1 %** av veljarunum fyri loysing. Í 1946 atkvøddu **33 %** av veljarunum í Føroyum fyri loysing.

Leggjast má afturat, at í 1918 atkvøddu íslendingar um ein sáttmála um fullveldi, sum var gjørdur av dønum og íslendingum í felag og samtyktur á Altingi. Í 1946 atkvøddu føroyingar um 2 spurningar. Eitt stjórnartilboð, sum danska stjórnin einsamøll hevði lagt úr hondum, og stovnan av føroyska tjóðveldinum við loysing frá Danmark. Hóast hetta fekk loysingin meiriluta.

**Fyri Hesuferð
Erla Olsen**

# Hin illgrunasami Bjørn á Heygum!

Hvat vil hesin Bjørn?

Jú, illgrunin er tann, at Bjørn vil ikki hava nakra kanning av Signari á Brúnni. Tí vil hann frá síðulinjuni forpurra málið, nú ein kanningarstjóri er settur. Ein heilt ótrúligur *frekleiki.*

Hann, Bjørn, ætlar at seta teir 13 tingmenninar upp á pláss, sum hava undirskrivað at ein kanning skal setast í verk.

Hetta kemur frá einum persóni, sum er uttan fyri tingsins gátt.

Soleiðis arbeiðir, um eg so má siga, *faðirin* at nýggju stýrisskipanarlógini. At fólk uttan fyri tingið skulu hava størri vald enn tey fólkavaldu umboðini á tingi. – Eg meini tað.

**Dia Ellindsson,
tjóðveldismaður
Runavík**



# Seta tiltøk í verk eftir skottilburðin

*Landsstýrismenninir í heilsumálum og skúlamálum hava tikið stig til at betra um sálarliga kreppuhjálpina í kjalarvørrinum av skottilburðinum í Klaksvík*



*Nú skal hjálp veitast skúlaleiðslu og lærarum í Klaksvík til at viðgera nógv umrødda skottilburðin saman við næmingunum, siga tveir landsstýrismenn*

EYÐUN KLAKSTEIN

Nú skal hjálp veitast skúlaleiðslu og lærarum í Klaksvík til at viðgera nógv umrødda skottilburðin saman við næmingunum.

Hetta er ein partur av eini ætlan, sum Høgni Hoydal og Helena Dam á Neystabø, landsstýrismenn, hava tikið stig til.

Teir báðir landsstýrismenninir almannagjørdu í gjár eina ætlan, sum skal betra uim sálarligu kreppuhjálpina í kjalarvørrinum á skottilburðinum í Klaksvík fyri 10 døgum síðani.

– Skottilburðurin í Klaksvík elvdi tíbetur ikki til kropsligan mannskaða, men sálarfrøðisligi skaðin kann gerast stórur og krevur viðgerð – bæði hjá teimum sum framdu, hjá avvarðandi, skúlafeløgum og í samfelagnum annars, siga landsstýrismenninir.

Tí hava tey tikið stig til, at at samskipa hjálp og stuðul frá myndugleikunum og at betra um støðuna við sálarligu tilbúgvingini sum heild.

**Allir skúlarnir í landinum viðgera tilburðin**

Høgni Hoydal, sum er landsstýrismaður við skúlamálum, og Helena Dam á Neystabø, landsstýrismaður við heilsumálum, hava tikið stig til, at sálarfrøðingar innan heilsuverkið og skúlaverkið í felag skulu viðgea, hvussu hjálp kann veitast til at stuðla barnaverndini í Klaksvík, teimum avvarðandi og skúlamynugleikunum.

Hjálp skal veitast til skúlaleiðslu og lærarar í Klaksvík til at viðgera tilburðin saman við næmingum.

Samstundis biðjur landsstýrismaðurin í skúlamálum allar skúlar í landinum um í samráði við Sernámsdepilin at viðgera tilburðin saman við næmingunum.

– Hesi stig eiga at verða framd í samstarvi við kommunu, løgreglu, kriminalforsorg, barnaverndir og aðrar myndugleikarnar, siga landsstýrismenninir.

Ein arbeiðsbólkur er í ferð við at fyrireika eina tilbúgvingarætlan fyri Føroyar. Í hesum sambandi eigur ein heildarætlan fyri sálarliga kreppuhjálp at fáa politiska viðger, halda landsstýrismenninir.

Í løtuni er eingin skipað sálarlig kreppuhjálp í Føroyum, og tí er eingin til reiðar at taka sær av fólki, sum koma út fyri tilburðin sum tí í Klaksvík.

Men stendur tað til landsstýrismenninar verður hetta broytt í framtíðini.

# Norsk skip undir fylgisveinaeftirlit

SVEINUR TRÓNDARSON

Tíðirnar broytast og tøkniliga menningin ger, at tað, sum fyri bert fáum árum síðani var óhugsandi, er ikki so veruleikafjart í dag. Fyrr vóru fylgisveinar nakað, sum úr rúmdini hugdu eftir tí sum fyrifórst á jørðini, og hóast teir gera tað sama í dag, so er arbeiðsøki teirra alsamt størri í dag.

Í Noregi hevur fiskivinnuumsitingin júst boðað frá, at øll fiskiskip longri enn 24 metrar skulu í eina skipan, har fylgt verður við teimum um fylgsisvein, skrivar Vinnuhúsið. Við hesi skipan ber til at ansa eftir skipunum, líkamikið um tey eru í norskum ella atjóða sjógvi.

Afturat longdaravmarkingini hevur umsitingin gjørt av, at øll skip, sum fiska í altjóða sjógvi, skulu undir fylgisveinaeftirlit.

# Rætting um næmingar í Hoydølum

HØGNI MOHR

Í greinini »Næmingar úr Hoydølum vunnu«, um European Business Game, sum stóð í blaðnum í gjár, er ymiskt komið fullkomuliga skeivt fyri.

Í greinini stendur, at hetta er fjórðu ferð at skipað verður fyri hesari kapping. Tað er ikki rætt. Skipað hevur verið fyri hesari kapping í fleiri ár enn so. Hinvegin er tað fjórðu ferð, at føroyingar luttaka.

Somuleiðis stendur at lesa í greinini, at Fiskivinnuskúlin í Vestmanna hevur vunnið tvær ferðir; einaferð í Føroyum og einaferð í evropeisku finaluni.

Hetta er púra villleiðandi. Fiskivinnuskúlin í Vestmanna vann kappingina í Føroyum tvær ferðir, í 1997 og í 1999. Síðani slapp skúlin víðari til evropeisku finaluna. Og hana vann Fiskivinnuskúlin eisini, bæði í 1997 og í 1999.

**Bara ein luttakandi bólkur**

Eisini skal staðfestast, at Studentaskúlin vann innleiðandi føroysku kappingina í 1998 og í ár. Í 1998 vann skúlin eisini evropeisku finaluna. Hesa evropeisku finalu sleppur studentaskúlin aftur í í ár, tí hann jú hevur vunnið í Føroyum.

Í greinini í gjár, sum Vinnuhúsið hevur latið úr hondum, vantar eisini ein týdningarmikil upplýsingur.

Tað stendur, at studentaskúlin vann innleiðandi kappingina. Hetta er, sum so, púra rætt. Men næmingarnir vóru einsamallir luttakarar. Tískil var eingin verulig kapping ella mótstøða, hóast hugsaða verkætlanin hjá næmingunum í Hoydølum uttan iva er sera væl úr hondum greidd.

